## Nýtt lógarverk samtykt

Á aðalfundinum leygardagin tóku føroysku fótbóltsfeløgini undir við nýggja lógarverkinum. Hetta merkir í prinsippinum, at FSF nú ikki longur einsíðugt gevur seg undir lógirnar hjá ÍSF. Sammbært FIFA-standardreglunum, so skulu øll mál innan fótbóltin avgreiðast av fótbóltinum sjálvum. Og tí kemur FSF eitt nú ikki longur undir reglurnar um Ítróttardómstólin.

**-mørk**

## Flytingarvindeyga ásett

Føroyskur fótbóltur skal nú eisini venja seg við, at tað bert eru ávís tíðarbil á árinum, at sáttmálaspælarar kunun skifta felag. Framyvir verður tað so, at tað bert verða tvey tíðarbil, har flytingar eru loyvdar. Frá 1. november til seinasta dag í februar kunnu spælarar skifta felag. Eins og hetta er loyvt frá hálvum juni og fimm vikur fram.

**-mørk**

# Michael Schumacher vann í Evropa

**Munurin í kappingini um heimsmeistaraheitið í formil 1 minkaði aftur í gjár, tá Michael Schumacher vann koyringina á Nurburgring framman fyri Fernando Alonso.**

FORMIL 1

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Evropeiska formil 1 koyringin á Nurburgring gjørdist sera spennandi, í umleið 40 umfør var sjáldan meira enn eitt sekund ímillum Fernando Alonso á 1. plássi og Michael Schumacher á 2. plássi, men við frálíkari pittstrategi megnaði Ferrari at sleppa framum Fernando Alonso í seinasta pittsteðgi, og komin framvið hugdi Michael Schumacher ikki aftur um seg og vann koyringina sannførandi.

Felipe Massa lá alla koyringina á 3. plássi og hóast hann eina løtu nærkaðist Alonso á 2. plássi og Räikkönen á 4. plássi nærkaðist honum í móti endanum, so helt hann fast í triðja plássi. Men 2, 3 og endaðu sera tættir. Fyri unga brasiliumannin Massa var hetta fyrstu ferð á sigursskamlinum, og tað varð hátíðarhildið við einum sjampanju brúsibaði.

Men eisini Barrichello, Fisichella og Rosberg á 5., 6. og 7. plássi vóru sera tættir. Tað merkti alla koyringina, at tættir nærdystir vóru alla tíðina. Serliga fyri Nico Rosberg, ið byrjaði aftastur var koyringin imponerandi.

9 bilar komu ikki á mál, umframt Liuzzi og Coulthard, ið rendu saman á fyrsta umfari, vóru tøkniligir trupuleikar orsøkin til, at bilarnir ikki komu á mál. Enn einaferð var Honda motorurin hjá Jenson Button óskkiligur og helt uppat við at rigga miðskeiðis í koyriningi. Barrichello á fimta plássi, er neyvan eitt serliga stórt plástur á sárið hjá liðnum, ið hevði so stórar vónir, áðrenn kappingarárið byrjaði.

Eisini í Toyota liðnum tyktust fólk vónbrotin. Á heimabreytini framman fyri øllum starvsfólkinum hjá liðnum, ið starvast eitt hanagleiv frá breytini endaði Jarno Trulli á 9. plássi uttan fyri stigini. Ralf Schumacher, ið enn einaferð koyrdi sannførandi lá á sætta plássi, inntil motorurin brendi saman sjey umfør áðrenn endan.




*Sjeyfaldi heimsmeistarin Michael Schumacher koyrdi fyrstur um málstrikuna á Nurburgring (mynd: Scanpix.dk)*

## FAKTA

**ÚRSLITIÐ Á NURBURGRING**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Michael Schumacher Ferraria | 10 |
| 2 | Fernando Alonso Renault | 8 |
| 3 | Felipe Massa Ferrari | 6 |
| 4 | Kimi Räikkönen McLaren-Mercedes | 5 |
| 5 | Rubens Barrichello Honda | 4 |
| 6 | Giancarlo Fisichella Renault | 3 |
| 7 | Nico Rosberg Williams-Cosworth | 2 |
| 8 | Jacques Villeneuve Sauber-BMW | 1 |
| 9 | Jarno Trulli Toyota | |
| 10 | Nick Heidfeld Sauber-BMW | |
| 11 | Scott Speed STR-Cosworth | |
| 12 | Tiago Monteiro MF1-Toyota | |
| 13 | Christian Albers MF1-Toyota | |

**KOMU IKKI Á MÁL**

- Ralf Schumacher Toyota
- Juan Pablo Montoya McLaren-Mercedes
- Takuma Sato Super Aguri-Honda
- Jenson Button Honda
- Frank Montagny Super Aguri-Honda
- Christian Klien RBR-Ferrari
- Mark Webber Williams-Cosworth
- David Coulthard RBR-Ferrari
- Vitantonio Liuzzi STR-Cosworth

**MEISTARAHEITIÐ FYRI KOYRARAR**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso, Spania | 44 |
| 2 | Michael Schumacher , Týskland | 31 |
| 3 | Kimi Räikkönen, Finnland | 23 |
| 4 | Giancarlo Fisichella, Italia | 18 |
| 5 | Felipe Massa, Brasilia | 15 |
| 6 | Juan Pablo Montoya, Kolumbia | 15 |
| 7 | Jenson Button,Ongland | 13 |
| 8 | Ralf Schumacher, Týskland | 7 |
| 9 | Rubens Barrichello, Brasilia | 6 |
| - | Mark Webber, Avstralia | 6 |
| - | Jaques Villeneuve, Kanada | 6 |
| 12 | Nick Heidfeld, Týskland | 5 |
| 13 | Nico Rosberg, Týskland | 4 |
| 14 | Christian Klien, Eysturríki | 1 |
| - | David Coulthard, Skotland | 1 |

**MEISTARAHEITIÐ FYRI LIÐ**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Renault | 62 |
| 2 | Ferrari | 46 |
| 3 | McLaren-Mercedes | 38 |
| 4 | Honda | 19 |
| 5 | Sauber BMW | 11 |
| 6 | Williams-Cosworth | 1 |
| 7 | Toyota | 7 |
| 8 | Red Bull Racing Ferrari | 2 |